# landgrunninum





*Skipið er sera vælútgjørt til at gera seismiskar kanningar á landgrunninum*



*Absalon Eliassen, MRCC umboðið umborð á Malene Østervold tosar við umboð fyri Chevron og Wavefield um komandi seismiska arbeiðið á landgrunninum*



*Sveisarar frá Skipasmiðjuni væl móttiknir umborð á seismikkskipi*

Chevron metir sum eitt stórt oljufund. Mangt bendir á, at jarðfrøðiligu viðurskiftini føroysku megin markið eru álík teimum, har Chevron hevur gjørt eitt stórt fund í bretskum umráði.

Síðani er tað seismikkfelagið OMH, sum byrjaði kanningarnar 8. september. Skipið eitur OHM Express.

Triðja felagið eitur GX Technology og byrjaðu kanningarnar 6. september við skipinum Discoverer.

Sosialurin skilur, at kanningarnar fevna yvir ein rættiliga stóran part av landgrunninum, fyrst og fremst framvið markinum. Áhugavert er eisini, at kanningarnar eisini eru heilt har suðuri á landgrunninum.




*Kortið vísir, hvussu stóran part av landgrunninum eitt av seismikkfeløgunum, GX Technology fer skjóta seismikk á*